# Fingu allar neyðugar upplýsingar

**Formaðurin í uttanlandsnevndini hjá løgtingium vísir staðiliga aftur, at málið um yvirtøkulógirnar er so illa lýst, at tjóðveldisflokkurin og miðflokkurin høvdu rætt til at boykotta Løgtingið**

BOYKOTT
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin*

– Tjóðveldisflokkurin og miðflokkurin fingu alt at vita, sum teir høvdu brúk fyri.

Johan Dahl, formaður í uttanlandsnevnd Løgtingsins, vísir staðiliga aftur, at málið um yvirtøkulógirnar varð so illa lýst, at Løgtingið kundi ikki taka støðu til tað.

Í øllum førum mettu tjóðveldisflokkurin og miðflokkurin, at málið var so illa lýst, at teir noktaðu at taka lut í atkvøðuni og løgdu sostatt alt tingarbeiðið lamið tað mesta av eimum tíma fríggjadagin.

Teir søgdu at ein orsøk var, at uttanlandsnevndin hevði sýtt fyri at innkalla serfrøðingar í nevndina, sum kundu lýsa, hvørja ávirkan yvirtøkulógirnar fóru at fáa.

Hesum vísir formaðurin í uttanlandsnevndini aftur.

– Tað, sum tjóðveldisflokkurin og miðflokkurin gjørdu, var ósømuligt. Tað var at draga gøtulótir inn um tingsins gátt og tað var at niðurgera Føroya Løgting.

– Yvirtøkulógirnar hava fingið tað viðgerð, sum tær skulu hava og tí eru atfinningarnar frá andstøðuni høpisleysar.

Men tá ið nú andstøðan følir, at málið er ov illa lýst, er tað so rætt at sýta fyri at innkalla teir serfrøðingar í nevndina, sum teir høvdu brúk fyri?

– Fyrst av øllum staðfestir Johan Dahl, at tað er formaðurin sum ger av, hvør skal innkallast í nevndina at geva frágreiðing.

– Vit kallaðu tveir føroyskar serfrøðingar í nevndina og teir hava sjalvsagt lýst málið líka væl sum nakar útlendskur serfrøðingur hjá tjóðveldisflokkinum og miðflokkinum kundu gjørt. Talan var um báðar løgfrøðingarnar, Halgir Winther Poulsen og Kári á Rógvu.

– Harumframt ætlaði andstøðan at innkallað stjóran í Atlantsflogi og vinnulívsmannin, Egil Olsen, til at umrøða flogvallarmálið og útbyggingar av flogvøllinum fyri uttanlandsnevndini.

Tað vildi Johan Dahl ikki, tí hann metti ikki, at flogvallarmálið hevur nakað sum helst við yvirtøkulógirnar at gera.

– Tað má vera eitt mark fyri, hvør skal kallast inn, tí annars veit ongin, hvar vit enda. Tað, sum var til viðgerðar, vóru yvirtøkulógirnar og onki annað.



*– Tað má vera mark fyri, hvør skal innkallast at geva frágreiðing, annars veit ongin, hvar vit enda, sigur Johan Dahl, formaður í uttanlandsnevndini*

### Longt viðgerðina óneyðugt

– Men er tað rímiligt at formaðurin noktar at innkalla serfrøðingar í nevndina, sum nevndarlimir vilja sleppa at hoyra sjónarmiðini hjá?

– Vit mettu at teir føroysku serfrøðingrnir kundu lýsa málið líka væl sum teir útlendsku serfrøðingarnir, sum tjóðveldisflokkurin og miðflokkurin ætlaði at kalla í nevndina. Málið skuldi avgreiðast, áðrenn tingið fór til hús og at kalla útlendskar serfrøðingar í nevndina, hevði bara longt viðgerðina óneyðuga, uttan at málið hevði verið betri lýst fyri tað, enn føroysku serfrøðingarnir høvdu lýst tað.

Johan Dahl heldur nevniliga, at yvirtøkulógirnar eru ikki eitt serliga fløkt mál.

– Yvirtøkulógirnar eru ein politisk avtala og talan eru um tvey hampiliga einføld og greið mál. Tað snýr seg um, at vit kunnu yvirtaka mál, táið Løgtingið er sinnað til tað og hetta snýr seg um hvørji mál kunnu yvirtakast og sum ikki kunnu yvirtakast. Fløktari enn so er tað ikki, sigur formaðurin í uttanlandsnevndini.

Funnist hevur verið at samgonguni, tí hon ikki hevur roynt at finna semju í hesum máli?

– Í hesum máli er gjógvin ímillum samgongu og andstøðu so stór, at tað hevði verið ógjørligt at funnið semju, sigur Johan Dahl.

# Áttu at gjørt alt fyri at funnið semju

**Tjóðveldisflokkurin og miðflokkurin tóku eina óbúna støðu, tá ið teir boykottaðu løgtingið fríggjadagin, men framferðin hjá uttanlandsnevndini virkar heldur ikki heilt seriøs**

BOYKOTT
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Eg haldi ikki, at hatta var rætti mátin at vísa sína ónøgd uppá. Hinvegin haldi eg at teir hava orsøk til at vera ónøgd.

Jógvan Sundstein er ein av okkara royndastu politikarum, bæði í løgtingi og í landsstýri og hann hevur eisini verið løgtingsformaður.

Hann heldur ikki, at flokkarnir báðir gjørdu rætt, tá ið teir rætt og slætt boykottaðu Løgtingið fyri at vísa sína misnøgd við framferðarháttin hjá løgtinginum og uttanlandsnevndini tá ið yvirtøkulógirnar vóru til viðgerðar.

– Hetta var ikki rætti mátin og eg haldi, at tað eitt sindur óbúgvið at boykotta atkvøðugreiðsluna, sigur gamli topp-politikarin.

Men hinvegis skilir hann eisini, at tjóðveldisflokkurin og miðflokkurin eru ónøgdir við ta viðgerð, sum yvirtøkulógirnar fingu í uttanlandsnevndini og í løgtinginum sum heild.

– Viðgerðin í uttanlandsnevndini virkar ikki heilt seriøs og eg haldi heldur ikki, at tað var rætt av løgtinginum at skunda tvey so stór og týðandi mál ígjøgnum, tá ið ivaspurningarni nú einaferð vóru so stórir, sum teir vóru.

– Eg veit ikki um Løgtingið bara vil sleppa í summarfrí, ella hvat tað er, men í tveimum so stórum málum, eigur tingið at geva sær tað tíð, sum neyðug eg, fyri at viðgera málini til lýtar, tí tað er ongin fastur dagur ásettur fyri, nær Løgtingið skal í summarfrí og í veruleikanum er tingið saman til ólavsøku.

– Eg haldi, at løgtingið og uttanlandsnevndin kundi verið liðiligari í eini slíkari viðgerð.

Jógvan Sundstein sigur, at tá ið ynski eru frammi í uttanlandsnevndini um at tilkalla serfrøðingar í nevndina at lýsa málini, átti nevndin at gingið tí á møti.

– Eg haldi, at uttanlandsnevndin átti at tikið ímóti øllum upplýsingum í einum so týðandi máli sum tað yvirhøvur bar til at fáa fatur á, bæði frá løgfrøðingum og øðrum serfrøðingum.

Tí heldur Jógvan Sundstein, at tað var skeivt at sýta ynskinum frá andstøðuni um at kalla ávísar serfrøðingar til fundar í nevndini.

Kortini er hann ikki heilt so vísur í, at ístaðin fyri uttanlandsnevndina, skuldi málið verðið viðgjørt í eini serligari nevnd við øllum flokkum, so at allir flokkar fingu høvi til at viðgerða tað, har allir flokkar fingu umboðan.

– Um serligar nevndir skulu gerast, er altíð ein tulkingarspurningur um, hvussu týdningarmikið eitt mál er. Tað er eisini greitt, at tað hevur sínar avmarkingar at vera ein lítil flokkur, sum í hesum føri.



*Løgtingið átti at brúkt tað tíð, sum var neyðug fyri at finna semju, heldur enn attrumfa málið ígjøgnum, heldur Jógvan Sundstein*

### Gera alt fyri semju

Annars heldur Jógvan Sundstein, at yvirtøkulógirnar eru so stór og týðandi mál, at Løgtingið átti at gjørt alt fyri at rokkið einari fullari semju um tær.

Tað heldur hann átti at borið til.

– Tá ið tað enntá ber til at fáa sambandsflokkin at góðtaka yvirtøkulógirnar, átti tað als ikki at verið ómøguligt at snikka eina orðing til, sum hevði fulla semju í Tinginum.

Jógvan Sundstein sigur, at so átti tingið heldur at brúkt eina viku ella tvær, afturat upp á at samráðst um málið, til ein full semja varð funnin.

– Tað hevði eisini gjørt støðu okkara úteftir munandi sterkari, tá ið vit komu hartil, at lógin skal brúkast í verki.

Hinvegin dugir hann væl at síggja trupulleikan í at samsvar ikki er ímillum donsku og føroysku viðmerkingarnar.

– Men var tað eitt samt løgting, sum stóð aftanfyri lógina, hevði tað í øllum førum styrkt okkara støðu.

Jógvan Sundstein veit ikki um virðingin ímillum manna fyri Løgtinginum er lækkað so nógv í hesum máli.

– Men bæði tað, at Løgtingið skrumbla eitt so týðandi mál ígjøgnum og so tað, at andstøðan boykottaði atkvøðugreiðsluna økja ikki júst um virðingina fyri løgtinginum, sigur Jógvan Sundstein.